# Undirvísingarstýrið søkir eftir verkætlanarsamskipara

Hevur tú hug at royna teg í einum fjølbroyttum starvi í størstu KT verkætlan innan undirvísingarverkið nakrantíð?

**Um starvið**

Tú verður partur av kt-eindini í Undirvísingarstýrinum, sum komandi árini stendur á odda fyri at gera "KT-heildarætlanin 2021-25" til veruleika. Kt-eindin er verkætlanarskipað, sum eitt program við stýrisbólki, programskrivstovu og fleiri undirliggjandi verkætlanum, við hvør sínum stýrisbólki og verkætlanarleiðara.

Tú hevur leiklutin sum samskipari á programskrivstovuni og hevur ábyrgd av at samskipa og veita verkætlanunum tænastur og stuðul.

Arbeiðið í kt-eindini er á høgum fakligum stigi, og stórur dentur verður lagdur á gott samstarv og áhaldandi fakliga og persónliga menning.

**Uppgávur**

Uppgávurnar eru innan hesi virkisøki:

- Verkætlanar"hondbók", sum fevnir um stýringskoncept, arbeiðsleistir, amboð, mannagongdir og kt-skipanir
- Fíggjarstýring, projektarkiv og journalisering
- Avtalu- og kontraktstýring við samtarvspartar og veitarar
- Kunning, samskifti, heimasíðu og aðrir miðlar
- Rapportering og tilfar til leiðslu- og stýrisbólkafundir
- Samskipa, facilitera og luttaka á fundum og verkstovum, m.a. sum forrætningsgreinari

**Vit rokna við, at okkara nýggi starvsfelagi:**

- Hevur viðkomandi hægri útbúgving á master ella kandidatstøði
- Er vælskipaður, tænastusinnaður, proaktivur og megnar at hava nógvar bóltar í luftini
- Er liðspælari men dugir eisini at arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur góðar munnligar og skrivligar málførleikar á føroyskum og enskum

**Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari**

- Hevur góðar telduførleikar á superbrúkarastigi av m.a. MS office, Teams, Zoom, BSL leiðslukunning, Public 360, heimasíðum, Jira Software, Confluence og Helpdesk
- kann vísa á eftirútbúgving og royndir innan tey øki, sum starvið fevnir um

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tíðaravmarkað í 3 ár og verður lýst til setanar 1. januar 2022 ella skjótast tilber.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av prógvum, C.V. og møguligum viðmælum skal vera Undirvísingarstýrinum í hendi í seinasta lagi **23. nov. kl. 12.00**

**Umsóknin verður stílað til:**

Undirvísingarstýrið, Hoyvíksvegur 72, Postrúm 9, 110 Tórshavn ella við t-posti: undirvising@uvs.fo

Ynskir tú fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Dánjal Pauli Haraldsen, deildarleiðara, tlf. 281593 ella Hjalmar Hansen, stjóra tlf. 555045.